# Síðsta kríggið millum gudarnar í tónum og orðum




**Nýggja fløgan hjá Týr er ein varði innan føroyskan tónleik, men fyri óroynda lurtaran kann hon vera ein stórur biti at svølgja.**

UMMÆLI
*Fróði Stenberg*
*post@sosialurin.fo*

Síðan "Eric The Red" kom á hyllarnar á sumri í 2003, hevur tað bara gingið frameftir hjá føroyska tungmálms bólkinum Týr. Frá lokal konsertum í TB húsinum og ymsu høllunum í Havnini, er tað blivið til fleiri víðkaðar konsertferðir runt Evropa saman við bólkum, sum t.d. svensku mjøð bryggjarunum úr Amon Amarth og týsku hetjunum Die Apokalyptischen Reiter. So kann ein spyrja seg sjálvan hvat fer nú at henda, tá ið heimurin hevur hoyrt nýggju fløguna "Ragnarok".

Hjá tí óroynda lurtaranum, fer hendan útgávan, ið eisini tann fyrsta hjá bólkinum fyri nýggja plátufelagið Napalm Records, at vera ein heldur stórur biti at svølgja. Tað nyttar ikki at fara í holt við einstøk løg eftir sum tey hava so nógv í sær sjálvum. Í høvuðsheitum spæla Týr hálvgum progressivan víkingamálm við serligum íblástri frá gomlu kvæðunum. Hesaferð er tað Tórsteins Kvæðið, ið sameinar tað siðbundna við tí tunga og melodiøsa á sama hátt sum "Regin Smiðjur" og "Ormurin Langi" hava gjørt, og enn einaferð má staðfestast, at sanna merkisvøran hjá bólkinum enn megnar at skera gjøgnum inn á merg. Á lagnum "Victory"eru spælimenninir við Kristian Blak á odda á stuttari vitjan, og er hetta eitt frískt millumbil, áðrenn tungmálmurin setur inn aftur. Fløgan er á longd við ein vanligan Steven Seagal film t.v.s. næstan 70 minuttir, og er nógv av sokallaðum instrumentalum pørtum ímillum tey ógvusligu løgini, sum eru 6 minuttir í miðal.

Manningin í bólkinum hevur ment seg yvir allar vónir. Serliga eru tað høvuðsmaðurin Heri Joensen (sang og gittara) og Kári Streymoy (trummur), sum hava spælt seg upp í eina hægri eind. Jacob Hansen hevur gjørt eitt framúrskarandi arbeiðið við at fáa tað besta úr okkara monnum. Danin hevur eisini tikið sær av ljóðblandinum, og er væl ávegis til at blíva tann fimti limurin í bólkinum. Meira av øllum er komið aftrat tí, sum ein kundi hoyra á "Eric The Red". Tað er blivið størri rúm til tonsatal av riffum, melodium, ræddar harmonium, ja enntá dupultar bass trummur leita sær ofta fram í ljóðmyndina. Heri og Terji eru báðir óførir at fingrasurfa á sínum gittarum, tað er ein fragd fyri oyra at hoyra teirra fresarí á løgum sum t.d. "Wings Of Time" og "The Rage Of The Skullgaffer".

Okkara rósverdu víkingar hava við hesari framsøknu útgávu tikið eitt stórt stig fram og víst dirvi. 16 væl skipaði løg, ílatin í einum knúsandi tungum ljóðið, og so snúgva tekstirnir seg um síðsta kríggið millum gudarnar, sum at enda fremur heimsins enda sambært nørrønu gudalæruni. Jú, "Ragnarok"er sanniliga eitt víkinga undur og uppaftur meira ein varði innan føroyskan tónleik.

# Villmenn við góðari javnvág

**Villmenn royna seg bæði við tí siðbundna og tí meira eksperimenterandi á Villmannatjóðini, ið kom út stutt fyri jól.**

UMMÆLI
*Fróði Stenberg*
*post@sosialurin.fo*




Langt um leingi er triðja fløgan hjá Villmonnunum komin á marknaðinum. At hesin bólkurin hoyrir til eina sjáldsama grein av skemtiligum kompromileysum rokktónleiki, skulu flestu fólk nokk skjótt blíva samd um, og tað vísa teir eisini á nýggju útgávuni "Villmannatjóðin", ið kom út í desember mánaði.

Innihaldi á fløguni er fjølbroytt, men tann trúgvi fjepparin skal nokk hoyra tað góða gamla, ið gjørdi hann til viðhaldsfólk á fyrsta sinni. Sjálvur er undirritaði tikin á bóli. Holgar og Co. leggja sera flot út við "Bangin" og "Kvølur". Bæði løgini mugu sigast at vera annarleiðis, enn eg hevði væntað. Fyrst nevnda hevur eitt einfalt men barasta so fangandi guitar tema, at neyðugt er at flyta fingrarnar við. Á "Kvølur" eru tveir gestir; Rasmus Rasmussen, fyrrverandi úr Makrel, spælir eina sveimandi solo, og sjálvur Terji Rasmussen, ið eisini framleitt fløguna í studio Oyravox úti í Nólsoy, hjálpir til við akkustiskum guitara. Nógv kann sigast um hvussu skitnir og tvætlutir teir fýra í Villmonum eru, men her er onki at taka feil av, ein sonn perla av einari ljóðmynd, her hava teir fatur á nøkrum heilt serligum.

Sjálvt um bólkurin úr Vágum hevur tikið eitt stig fram í sínari menning, so varðveitir hann eisini gomlu røturnar. Lurtarin hoyrir týðiliga, at teir hugna sær óført við sínum villmannarokki, sum kanska ikki er so spennandi, men svingar heilt væl. Lagið "Cyberspace" fekk góð orð við sær í blaðnum í fjør, og er tað eisini eitt av teimum meira nýskapandi verkunum á fløguni. Tá hetta stuttliga og heldur friðarliga lagið eru liðugt, vísur bólkurin veruliga sín kærleika fyri skitna rokkinum, tá teir tríva í "Gamlamannareyp", sum skal nokk fáa lív aftur í gamlar dreingir kring landið.

Bólkurin hevur eina góða javnvág ímillum tað siðbundna og tað eksperimenterandi. Her eru bæði merkisverd løg og siðbundin útbrót av vágarokki. Eitt gott dømi er tann bleyta unplugged vibrationin á lagnum "Cleopatra", sum vísur aftur til ein bólk, ið er í menning, tá talan er um tóna skriving. Men so er eisini nokk. So verður tendrað fyri forsterkarunum, skift í skræddar buksir, á við sólbrillunum, øl á borðið og sigarettuna í kjaftin og so rokkar lagið "Kaninaldurin" úr hátalarunum.

Niðurstøðan er so tann, at "Villmannatjóðin" er ein fín útgáva til bæði nýggja og eldra ættarliðið at njóta. So satt sum atdráttarmegin er áhaldandi frá degi til degi, soleiðis kann ein altíð líta á Villmenn at spæla góðan gamlan rokktónleik, men tó er greitt at teir vilja og kunna annað enn bara tað.